## – Kappingin verður jøvn

Birgir Hansen, sum stendur á odda fyri besta kvinnuliðnum hjá Neistanum, væntar, at kappingin í komandi kappingarári verður jøvn. Tað sigur hann við heimasíðuna hjá Neistanum. – Eg haldi, at Neistin, VÍF, og VB koma í hølinum á Tjaldri og Stjørnuni. Tá tað er sagt, so vóni eg, at Tjaldur og Stjørnan ikki sleppa so lætt sum seinasta kappingarár. VB, VÍF og Neistin fara at taka stig frá Tjaldri og Stjørnuni, og vit fáa heilt víst eina nógv javnari kapping enn seinasta vetur, sigur Birgir Hansen við heimasíðuna hjá Neistanum.



## Skála flytir upp

Skála skal spæla í næstbestu fótbóltsdeildini í 2011. Liðið er fremst í triðbestu deildini, aftaná seinasta leikumfar, sum varð avgreitt leygardagin. Skála vann heili 7-0 á heimavølli móti MB í seinasta dystinum. Skála fór raplandi niður úr bestu deildini og niður í triðbestu deildin eftir tveimum árum. Nú er liðið aftur millum teir næstbestu. Millum spælararnar hjá Skála eru Bogi Gregersen, Teitur R. Joensen og Alexandur Johansen, sum eisini spældu, tá Skála var í bestu deildini. Venjarar hjá Skála eru Alexandur Johansen og Eliesar Jónsson Olsen.

# ÍSF loddar dýpið

### Ítróttarsambandið vil verða dagført, og hevur tí gjørt av at senda spunarbløð til føroysku ítróttarfeløgini

Uni Holm Johannesen

Spurnarblað varð um vikuskiftið sent einstøku limafeløgunum í ÍSF.

– Vit vilja vera dagførd, og tí lodda vit dýpið hjá feløgunum, sigur Petur Elias Petersen, sum er forseti í ÍSF.

Tað verður nú heitt á føroysku ítróttarfeløgini at svara spurningum um umsitingarligu og fíggjarligu avbjóðingarnar komandi árini.

ÍSF metir, at tað er av stórum týdningi at hava slík hagtøl at vísa á fyri politisku myndugleikunum.

**Umráðandi**

Petur Elias Petersen er sannførdur um, at tað fer at gagna ítróttinum.

Millum spurningarnar eru, um tað er truplari at fáa nevndarlimir og fíggjarligu endarnar at røkka saman.

– Vit vita, at tað verður lagt eitt ótrúliga stórt sjálvboðið arbeiði í ítróttarfeløgini. Tað eru bara fótbólturin, og einstakir spælarar og venjarar í hondbólti, sum fáa løn fyri sítt stríð. Krøvini eru eisini harðna munandi seinnu árini. Tí mugu vit vita, um føroyingar eru eins sinnaðir at nýta tíðina í ítróttarfeløgum, ella um tað er truplt at fáa nevndarlimir og annað. Tað mugu vit fáa greiðu á, sigur Petur Elias Petersen.



*Petur Elias Petersen, ÍSF forseti*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

Endamálið er somuleiðis at fáa skrásett, hvussu nógvir føroyingar fáast við ítrótt, og hvussu stór orku verður lagt í ítróttararbeiðið kring landið. Talan er um íðkandi, venjarar, leiðarar og onnur.

Feløgini verða spurd, hvørjar avbjóðingar, tey meta eru hinir størstu, og tey verða biðin um at gera eina meting av avbjóðingunum, sum komandi árini fara at hava við sær.

**Vísa myndugleikunum**

Tað er umráðandi at hava greið hagtøl at vísa á, um Ítróttarsambandið fer at togast við politisku myndugleikarnar.

Ítrótturin fær sera stóra rúmd í Føroyum, og tað eru bara fyrimunir, um tú hevur tøl, sum vísa, hvussu stór orka verður løgd í ítróttin.

– Vit skulu eisini hava fingurin á pulsinum, og vita, hvønn veg føroyskur ítróttur flytir seg. Við hesum fáa vit greið tøl, sum siga, hvørjum vit skulu arbeiða við, sigur Petur Elias Petersen, sum er forseti í ÍSF.

Ætlanin er, at úrslitið av kanningini er klárt í heyst.

*uni@sosialurin.fo*



# Ragnar Isaksen vann

Klubbmeistarakappingin í holspæli hevur verið um vikuskifti. Átta av teimum bestu í meistarakappingini í slagsspæli, sum varð spælt 28. og 29. august, vóru við í kappingini.

Ragnar Isaksen og Óskar Eiriksson rukku finaluni, sum varð avgreidd sunnudagin. Ragnar Isaksen varð fremstur og kann rópa seg klubbmeistara, aftaná ein sera javnan dyst, sum varð avgjørdur á 17. holi.

Harald Eirikstoft vann kappingina um triðja pláss. Hann vann á Janusi Norðberg.

Bara tvær kvinnur luttóku. Óluva Lómsstein vann finaluna á Finngerð Hansdóttir.

Holspæl verður spælt soleiðis, at tveir spælarar spæla móti hvørjum øðrum, og vinnarin fer víðari í kappingini, sum er skipað eftir kupp-leisti, har taparin rýkur út.

*uni@sosialurin.fo*